# Sløkkivenjing á eldrasambýlinum á Toftum

**Eldrasambýlini eru stórir bygningar við lutfalsliga fáum fólkum til arbeiðis í senn, og tí er skilagott, at tær, sum eru til arbeiðis, vita, hvør teirra uppgáva er undir slíkum umstøðum**

TRYGD
*Orð & myndir: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tíggju kvinnur, sum eru knýttar at eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum, vóru á skeiði í eldsløkking týsdagin. Mikudagin skuldu tær luttaka á skeiðnum, sum ikki vóru við tann fyrra dagin*

Týsdagin vóru tveir mans frá Skálafjarðar Sløkkiliði á eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum og kunnaðu starvsfólkið á stovninum um tryggleikaspurningar í samband við eldsbruna og sløkking av eldi.

Kunningin tók tilsamans tveir tímar, har fyrsti tímin var teoretiskur. Hesin parturin fevndi eisini um eina gjøgnumgongd av bygninginum – og hvussu starvsfólkið eigur at fyrihalda sær, um eldur kemur í.

Seinni parturin fór fram í túninum omanfyri húsið, har starvsfólkini eisini sluppu at royna seg við at sløkkja eld – við vatni, brandteppi, pulvuri og einum grýtuloki.

Samstundis, sum fyntligu sløkkiliðsmenninir vístu starvsfólkunum, hvussu tey í praksis eiga at gera – og ikki eiga at gera, greiddu teir eisini frá, meðan kvinnurnar sluppu at royna seg.

Sløkkiliðsmenninir vóru væl nøgdir við tað, sum starvsfólkini vístu, og annar helt fyri, at tað kundi sæð út, sum um fleiri av hesum kvinnum høvdu roynt at sløkt eldar áður!

Allar sluppu tær at royna seg, og allar megnaðu og tordu tær at sløkkja eldar við brandteppinum og pulvursløkkjaranum.

### Tilbúgving

Hetta er eitt skilagott tiltak, og eingin ivi er um, at tað økir um tryggleikan, um tað ringasta skuldi hent á einum slíkum stovni.

Sum skilst, fer stovnurin nú at skipa eina ávísa tilbúgving, har ein ætlan verður løgd sum sigur, hvussu starvsfólkið skal fyrihalda seg, um eldur kemur í.

Eldrasambýlini eru stórir bygningar við lutfalsliga fáum fólkum til arbeiðis í senn, og tí er skilagott, at tær, sum eru til arbeiðis, vita, hvør teirra uppgáva er undir slíkum umstøðum.

Leiðarin á eldrasambýlinum á Toftum, Anna Jacobsen, var eisini við hendan dagin, og hon helt tað vera eitt gott hugskot, at Sosialurin var við hendan dagin og tók nakrar myndir av tiltakinum.

Tær 10 kvinnurnar, sum luttóku á skeiðnum týsdagin, gjørdu hetta í síni frítíð.

Í gjár skuldu so tær 8-9 kvinnurnar, sum ikki vóru við tann fyrra dagin, á hetta sama skeiðið á eldrasambýlinum, Vesturskin.



*Tað vóru menn frá Skálafjarðar Sløkkiliði, sum tóku sær av kunningini og vístu, hvussu eldur skal sløkkjast*



*Sunnleif Højgaard og hjálparmaður hansara dugdu væl at greiða frá, hvussu eldur skal »handfarast«*



*Allar sluppu tær at royna seg við brandteppinum og pulvursløkkjaranum – og allar tóku tær uppgávuna í álvara*



*Nú er at raka beint! Allar megnaðu teir sína uppgávu til fulnar, bæði við pulvursløkkjaranum og við brandteppinum. Undrunarvert var at síggja, hvussu væl pulvurið sløkkir eld*

## Guðrun skal stríðast um finalupláss

**Fríggjakvøldið verður Guðrun Sólja Jacobsen við í seinnu hálvfinaluni í Stjørna í eitt kvøld, og har skal hon royna at gera ein av teimum trimum, sum fara víðari til finaluna. Hon fer syngja kendan sang hjá Whitney Houston**



TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi um, at Gurðun Sólja Jacobsen eigur eina tí kendastu røddina frá tónleikakappingini Stjørna í eitt kvøld. Fríggjakvøldið skal hon aftur vita, um fólk kring Danmark – og í Føroyum – vilja hava hana víðari í kappingini. Tá verður seinna hálvfinalan hildin í einum upptøkuhølum í Århus, og DR og SvF syrgja sum vanligt fyri, at kappingin verður varpað út til allar danir og føroyingar.

### Syngur Houston

Seks fólk fara at syngja í hálvfinaluni, og helvtin av teimum kemur víðari til stóru finaluna, sum verður hildin í Herning síðst í mánaðinum.

Guðrun sang í innleiðandi kappingini kenda Lennon-sangin, Imagine, men í hálvfinaluni fer hon yvir um Atlantshavið eftir einum sangi. Hon fer at tulka sangin »Run To You« hjá songkvinnuni Whitney Houston.

### Kappast við Jakob

Umframt Guðrun Sólja Jacobsen er eisini Jakob Andersen við í hesari kapping. Hann var í finaluni, tá ið Guðrun vann, og tey hava síðani fleiri ferðir sungið til somu konsertir. Nú skulu tey aftur kappast, men møguleikin er, at tey koma bæði víðari.

Stóra finalan í Stjørna í eitt kvøld verður hildin 25. februar, og tað er ein møguleiki fyri, at Guðrun Sólja Jacobsen verður ein av sangarunum í finaluni.